gult cyan magenta svart



# »Just a beginning«

**“This is just a beginning”, segði Fredrik Schauer, professari, dekanur og lestraleiðari, í eini samrøðu við formannin í grundlógarnevndini**

FERÐAFRÁSØGN ÚR USA GRUNDLÓGARNEVNDIN

Hetta fór fram við eitt borðhald í The Harvard Faculty Club, har alt ferðalagið hjá grundlógarnevndini saman við fleiri stjórnargranskarum var boðin til ein døgurða, har dekanurin var vertur. Føroyar eru nú eisini komnar á landkortið hjá hesum fólkum, sum ferðast um allan heim og geva stjórnum ráð á hægsta stigi.

Kennedy School of Government er ein víðagitin skúli, sum er partur av Harvard Universitetinum. Kennedy skúlin hevur ráðgivið mongum londum, ið hava skrivað grundlógir seinnu árini, millum annað Estlandi og øðrum londum í Eystureuropa, eftir at tey fingu frælsi aftur. Í løtuni stendur skúlin á odda fyri eini verkætlan um grundlógir hjá teimum mongu indianaratjóðunum í USA. Hergeir Nielsen, formaður í uttanlandsnevndini, skifti orð við Eric Lemont um støðuna hjá indianaratjóðum og amerikanskum statum mótvegis amerikanska samveldinum.

Umleið helvtin av teimum lesandi á skúlanum kemur úr øðrum londum. Sløk 800 lesa við skúlan, sum bert hevur framhaldsútbúgvingar, masterútbúgvingar og doktaraútbúgvingar.Tey lesandi eru vís í at læra at kenna meginpartin av komandi leiðarum heimsins. Evnarík lesandi úr øllum heiminum fáa stuðul úr ymsum grunnum at gjalda skúlagjaldið.



*Myndin er frá seinasta fundinum hjá uttanlandsnevndini í Føroyum*



*Uttanlandsnevndin er í USA í hesum døgum*

Hetta gevur ein fantastiskan møguleika – “a fantastic opportunity for a bright Faroese student”, sum samfelagsfrøðingurin Jóannes Hansen segði við fyrrverandi ráðgevaran hjá Clinton í innanríkismálum, Elaine Keagan. Hon er eisini knýtt at lógarskúlanum á Harvard.

Fred Schauer hevði sett allan dagin av til grundlógarnevndina, og savnaði síni kønastu fólk at ráðgeva nevndini. Hetta var ein ómetaliga stórur heiður fyri nevndina, tí maðurin er annars ikki til at fáa fatur á. Tað helt ein av lærarunum á skúlanum, at vit skuldu vita. Jógvan á Lakjuni prátaði sum formaður í mentanarnevndini eisini við Fred Schauer, um møguleikar at fáa í lag samstarv millum Føroya og Harvard. Tað er hugsandi at føroyskir lesandi kunnu fáa innivist á Harvard til víðari lesnað.

Stórur áhugi var fyri grundlógararbeiðinum. Royndirnar vísa, at tær bestu grundlógirnar eru tær sum er skræddarseymaðar eftir mentan og søgu og viðurskiftunum í tí einstaka landinum, ikki umsettar úr øðrum londum. Fólkið eigur at vera uppi í at skriva grundlógina, helt Fred Schauer, men lógin má tó vera almenn og tíðarleys. Her liggur ein stór ábyrgd á teimum sum skriva lógina. Ein grundlóg eigur ikki at vera ov long. Nevnd varð Suðurafrikanska grundlógin, sum er millum tær longstu. Hon var í so long, helt onkur av granskarunum fyri.

Serfrøðingarnir hildu, at Føroyar við grundlógararbeiðinum høvdu ein heilt einastandandi kjans at fáa mong stjórnarskipanarlig viðurskifti í rættlag. Flestøll lond stríðast við viðurskifti, sum tey ikki fingu broytt, tí tey eru íkomin fyri langari tíð síðani. “Take the chance and do your very best”, vóru ráðini. Sjálvt um tað verða fólk í umsitingini og aðrastaðini, sum fara at verða hart ímóti broyting av verandi siðvenju, eigur tað ikki at forða nevndini í at hugsa og arbeiðaða sjálvstøðugt.

Grundlógarnevndin hevur síðani hildið leiðina fram til Nebraska at tosað við lærdar stovnar, tingmenn og stjórnarlimir.

# Danir fegnast

**Danskir politikarar fegnast um, at løgmaður ætlar at avlýsa fólkaatkvøðuna í mai. Teir halda, at tað er óðamannaverk at halda eina fólkaatkvøðu, áðrenn eitt samráðingarúrslit liggur á borðinum.**

FRAMTÍ_ARSTØÐA FØROYA
*Magnus Dam*

Hóast politiska støðan í Føroyum er ógreið og eingin við vissu veit, um fólkaatkvøða verður í mai, so vóru danskir politikarar skjótir við viðmerkingum, eftir at tíðindini um nýggju støðuna hjá Fólkaflokkinum fræettust fríggjadagin.

Úr at kalla øllum flokkum í Fólkatinginum kom sama viðmerking: Løgmaður hevur tikið eina klóka avgerð.

Danskir politikarar vóru ikki serliga fegnir, tá teir fyri einum mánað síðan hoyrdu um ætlaðu fólkaatkvøðuna. Flestu teirra vistu ikki betur enn, at embætismenn úr Føroyum og Danmark arbeiddu við einum uppskoti um at broyta heimastýrislógina, og tískil kom fólkaatkvøðn óvart á teir.

Nú løgmaður ætlar at avlýsa fólkaatkvøðuna, er støðan ein onnur. Peter Duetoft úr CD, sum er formaður í Føroya-nevndini hjá Fólkatinginum var fyrstur frammi at kalla avgerðina hjá løgmanni eina klóka avgerð. Hann heldur, at tað hevði verið løgið, um føroyingar skuldu til fólkaatkvøðu um eitt samráðingarútspæl, sum stjórnin frammanundan hevur vrakað.

Tí er tað gott, at løgmaður hevur tikið hesa avgerðina, segði hann við Ritzau-tíðindastovuna. Peter Duetoft hevur kortini einki ímóti, at ein fólkaatkvøða um loysing verður einaferð seinni, tá ið eitt samráðingarúrslit liggur á borðinum.

### Mugu kenna avleiðingarnar

Formaðurin í Vinstra, Anders Fogh Rasmussen, hevur somu støðu sum Peter Duetoft.

- Tað er skilagott at steðga við fólkaatkvøðuni, inntil vit hava fingið eitt samráðingarúrslit, so føroyingar vita, hvørjar avleiðingarnar verða, um teir loysa, sigur hann. Hann leggur afturat, at útmeldingin hjá løgmanni vónandi kann verða við til at fáa ein betri samráðingaranda millum landsstýrið og stjórnina.

Bendt Bendtsen, formaður hjá teimum konservativu, sum er bróðurflokkur hjá Fólkaflokkinum, heldur eisini, at avgerðin kann linka um spentu støðuna millum Føroyar og Danmark.

Jes Lunde úr SF leggur stóran dent á, at landsstýrið sjálvt ger av, hvussu leikur skal fara í hesum málinum. Men hann sigur kortini, at tað tykist sum tann skilabesta avgerðin av bíða við fólkaatkvøðuni, inntil samráðingarnar eru lidnar.

Samanumtikið kann sigast, at danskir politikarar ikki hava nakað ímóti og annars eru greiðir yvir, at ein fólkaatkvøða um framtíðarstøðu Føroya verður einaferð í framtíðini. Men enn er nakað tíðliga at spyrja fólkið, halda teir.

Næsti leikurin í langa talvinum hjá landsstýrinum og stjórnini liggur í Føroyum, og í forsætisráðnum situr Poul Nyrup Rasmussen helst spentur og bíðar. Hann hevur ikki vilja gjørt viðmerkingar til støðuna, nú líkt er til, at fólkaatkvøðan í mai verður av ongum.

gult cyan magenta svart



# Favorittarnir víðari



*Bólkurin Krit stóð fyri eini originalari framførslu við hørðum rocktónleiki, men bólkurin kom tó ikki víðari í kappingini.*

*Mynd: Robert Waagstein*

**Tað kom ikki óvart á nakran, at All that Rain og Tám vunnu triðja innleiðandi umfarið í Prix Føroyum, sum var í Klaksvík fríggjakvøldið**

PRIX FØROYAR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Nú eru seks bólkar funnir til stóru finaluna í Prix Føroyar tónleikakappingini.

Fríggjakvøldið var triðja innleiðandi umfarið í kappingini í Klaksvík, og tveir bólkar komu víðari frá hesum umfari.

All that Rain, sum er mannaður við fyrrverandi limum í Kjølum, vann kappingina sannførandi. Teir spældu fyrst, men høvdu eina frálíka framførslu við góðum rocktónleiki.

Á næstfremsta plássinum var bólkurin Tám, sum er mannaður við royndum tónleikarum úr høvuðsstaðnum.

### Eingin lokalur víðari

Um 800 fólk vóru til Prix Føroyar í Klaksvík. Kappingin varð hildin í KÍ-høllini, og umframt teir báðar vinnandi bólkarnar, vóru sjey aðrir bólkar á pallinum.

Trý lokal ískoyti vóru til kappingina, men eingin av bólkunum úr Klaksvík komu víðari frá umfarinum. Bólkurin PS kláraði tó at gera seg merktan við sínum øðrvísi tónleiki og sermerktu framførslu.

Bólkur Daybreak úr Havn spældi eisini sannførandi, men teir kláraðu ikki at syfta drivnu tónleikararnar í Tám.

Í blaðnum í morgin hava vit størri reportasju frá umfarinum í Klaksvík.

# Løgreglan boðsend

**Klaksvík:** Prix Føroyar er eitt tiltak, sum dregur nógv fólk.

Soleiðis er eisini í Klaksvík, har tiltakið savnar nógv fleiri fólk enn onnur líknandi tónleikatiltøk.

Um 800 fólk vórðu til Prix Føroyar í Klaksvík, og tey fingu fimm tímar við upprunaligum føroyskum tónleikaundirhaldi.

Alt gekk friðarliga fyri seg undir tiltakinum, hóast fólk vóru í góðum lag.

Seinni leygarnáttina var tó okkurt stríð í dansistaðnum Lognbrá, sum eisini heldur til í KÍ-høllini. Løgreglan varð boðsend, men tá hon kom á staðið, var alt yvirstaðið.




Curry og Ítróttur á Glyvrum

Frá 28/2 verða Curri og Ítróttur á Glyvrum lagdir saman í eitt, og fara handlarnir báðir framyvir at halda til í hølinum hjá Ítrótti á Glyvrum.

Í tí sambandi bjóða vit viðskiftafólki okkara hesi tilboð:

| | Fyrr | Nú |
|---|---|---|
| Nike og Adidas renniskógvar | 799,- | 250,- |
| Adidas Samba blá/hvítir vaksin | 399,- | 299,- |
| Adidas Samba blá/hvítir børn | 299,- | 199,- |
| NIKE og ADIDAS skógvar | fyrr upp til 399,- | 150,- |
| Puma renniskógvar | 399,- | 248,- |
| Lotto fótbóltsskógvar | 999,- | 499,- |
| Lotto fótbóltsskógvar | 699,- | 349,- |
| Umbro fótbóltsskógvar | 349,- | 199,- |
| Asics renniskógvar | fyrr upp til 899,- | 299,- |
| Asics aeribicskógvar | 599,- | 299,- |
| Diadora innanduraskógvar | 349,- | 199,- |

Eisini verða fleiri góð klædnatilboð

CURRI & ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM
Tlf. 447399

Týsdagin er stongt

Sosialurin 31 18 20